# Klaksvíkar HF skeið væntandi flutt á Kambsdal

**Mentamálaráðið hevur skotið upp, at Klaksvíkar og Eysturoyar HF skeið verða savnað á einum stað eftir summarfrítíðina. Og í løtuni bendir alt á, at tað verður framtíðin hjá Klaksvíkar HF skeiði, sum kemur at liggja á Kambsdali**

FÍGGJARLÓG
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



Í sambandi við ummælisviðgerð hjá mentanarnevndini til fíggjarnevndina setti mentanarnevndin herfyri mentamálaráðharranum nakrar spurningar viðvíkjandi fíggjarætlanini fyri 2006 fyri miðnámsskúlar. Í svarinum gongur fram, at fíggjarætlanin er treytað av, at nú Norðoyartunnilin verður tikin í nýtslu, verður HF skeið bert skipað á einum stað í Norðoyar/Eysturoyarøkinum eftir summarfrítíðina.

### Høvuðsgrundgeving horvin

Eitt av heitu útbúgvingarevnunum í sambandi við ummælisviðgerðirnar til komandi fíggjarlóg verður uttan framtíðin hjá Klaksvíkar HF skeiði. Politisk avgerð er tikin um, at tey bæði HF skeiðini í Klaksvík og á Kambsdali verða savna á einum stað, men enn er ikki avgjørt, hvat av teimum skal flyta.

Spurningurin um at flyta Klaksvíkar HF skeið yvir í Eysturoynna hevur verið frammi fleiri ferðir fyrr. Ein av høvuðsgrundgevingunum fyri at varveita HF skeiðið í Klaksvík hevur verið, at næmingarnir so sleppa undan siglitúrinum um Lorvíksfjørð. Við Norðoyatunlinum hvørvur hendan grundgevingin, og tað er eftir øllum at døma hetta, sum nú aftur hevur gjørt kjakið um Klaksvíkar HF skeið átroðkandi. Og landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, dylur heldur ikki yvir, at eftir hansara tykki hevði tað verið mest natúrligt at flutt Klaksvíkar HF skeið yvir á Kambsdal, nú fasta sambandi um Lorvíksfjørð skjótt verður veruleiki.

- Sum mentamálaráðharri er tað mín skylda at rationalisera raksturin av skúlaverkinum, har tað ber til. Aftaná summarfrítíðina fer tað at taka næmingum í Norðoyggjum 10 minuttir í bili ella bussi at koma yvir á skúlan á Kambsdali, og tað vildi verið løgið, um tað ikki kom at ávirka mátan, tey bæði HF skeiðini hava verið skipað higartil, sigur Jógvan á Lakjuni.

*Eftir mínum tykki hevði tað verið mest natúrligt at flutt Klaksvíkar HF skeið yvir á Kambsdal, har hóskandi skúlaumhvørvi og læraraorka er frammanundan, sigur Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri*

Hóast tað hevði verið hugsandi, er tað í løtuni lítið sum bendir á, at HF skeiði á Kambsdali verður flutt til Klaksvíkar. Jógvan á Lakjuni sigur, at á Eysturoyar Studentaskúla og HF skeiði er eitt stórt og hóskandi skúlaumhvørvið frammanundan, umframt at lærararnir stórt sæð eru teir somu. Sum Jógvan á Lakjuni skilur, verða hølisviðurskiftini á Kambsdali ongin stórvegis trupulleiki.

Tað eydnaðist tíverri ikki at fáa eina viðmerking frá Sámal í Skorini, rektara á Kambsdali, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*Í løtuni bendir alt á, at framtíðin hjá Klaksvíkar HF skeiði kemur at liggja á skúlanum á Kambsdali*

Sigrun Skálagarð, deildarleiðari

# Ikki í tráð við Visión 2015

**- Útspælið hjá mentamálaráðharranum um at flyta Klaksvíkar HF skeið á Kambsdal samsvarar illa við Visión 2015 um miðnámsútbúgving til øll. Stóra umsøkjaratalið til skúlan hongur nettupp saman við, at skúlin liggur í nærumhvørvinum, sigur Sigrun Skálagarð, deildarleiðari á Klaksvíkar HF skeiði**

FÍGGJARLÓG
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Sigrun Skálagarð, deildarleiðari á Klaksvíkar HF skeiði, dylur ikki yvir, at hon heldur tað vera ein stóran miss fyri nærumhvørvið og ikki minst fyri næmingarnar í Klaksvík, um HF skeiðið verður flutt á Kamdsdal komandi skúlaár.

### Alternativið hvørvur

Sigrun vísir á, at Klaksvíkar HF skeið er tað einasta av sínum slag í Føroyum, sum í allar mátar virkar eftir upprunaligu ætlanini við einum HF skeiði - nevniliga sum eitt alternativ til aðrar miðnámsútbúgvingar.

- Tankin við eini HF útbúgving var jú frá byrjan, at tilkomin fólk, sum hava aðrar lívsumstøður enn ungir næmingar, eisini skulu hava møguleika at fáa eina miðnámsútbúgving. Og nógvir av okkara næmingum brúka nettupp hendan møguleikan at samskipa útbúgving við arbeiði, samstundis sum tey hava brúk fyri at vera í nánd av eitt nú ansingarstovnum hjá børnunum, sigur Sigrun, sum heldur ikki ivast í, at júst hetta er orsøkin til, at umsøkjaratalið til skúlan í Klaksvík er munandi størri enn á Kambsdali. Hon leggur afturat, at júst møguleikin fyri eitt nú at taka eitt HF prógv sum stakgreinalestur ofta er avgerðandi fyri, um fleiri av næmingunum yvirhøvur fáa eina miðnámsútbúgving. Tí heldur hon ætlanina hjá mentamálaráðharranum hanga illa saman við tankunum í Visión 2015 um miðnámsútbúgving til øll.

### Sosialt umhvørvi

Sigrun ivast eisini í, um tað ber til at endurskapa sama sosiala umhvørvið á einum so stórum skúla, sum honum á Kambsdali. Á Klaksvíkar HF skeiði hevur tað altíð verið siðvenja, at næmingarnir eisini brúka skúlan aftaná skúlatíð til eitt nú bólkaarbeiði og ikki minst í sambandi við próvtøkufyrireiking. Alt hetta er við til at skapa eitt sosialt skúlaumhvørvið, sum fær næmingarnar at trívast serliga væl. Tað er væl hugsandi, at góði trivnaðurin á skúlanum í síðsta enda eisini spælir ein stóran leiklut fyri, um næmingarnr gjøgnumføra útbúgvingina, hóast teirra lívsumstøður ikki altíð gera tað so høgligt at vera lesandi.

- Nú fáa vit at síggja. Men tað skuldi ikki undrað meg, um tað verða nógvir klaksvíkingar, sum droppað ætlanina um at fáa eina HF útbúgving, um skúlin verður fluttur yvir á Kambsdal, sigur Sigrun Skálagarð.

